## Álaker skal ruddast

Tórshavnar kommuna boðar frá, at tey nú fara at rudda gamlar bátar úr Álakeri. Eigarar av bátunum hava freist til 1. juli at gera vart við seg

Gamlir bátar, sum standa í Álakeri, verða fyrsta dagin fyribeindir uttan aðra ávaring, um eigarin ikki sjálvur syrgir fyri annaðhvørt at gera teir í stand ella koyra teir burtur. Hesum boðar Tórshavnar havn frá í lýsing um dagarnar.

Tað standa og liggja fleiri bátar, sum eru meira ella minni vrak, á umvælingarplássunum í Álakeri. Summir hava staðið harraleysir í áravís, og av tí, at eingi frámerki eru, sum vísa, hvør eigur bátarnar, fer leiðslan fyri Tórshavnar havn nú at gera bart og rudda plássið.
Boðað verður frá, at bátar, hvørs eigarviðurskifti ikki eru greið og fráboðað Tórshavnar havn í seinasta lagi 1. juli í ár, uttan aðra ávaring verða fyribeindir.



# Lena Andersen á konsertferð kring Evropa



**Lena skal í heyst spæla 19 konsertir í 10 ymiskum londum sum upphiting fyri avstralska tónleikarin Xavier Rudd.**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Lena og Niclas fara í heyst á ferð kring Evropa. 19 konsertir í 19 ymiskum stórbýum, skulu kunna heimin um navnið Lena Andersen. Tað er avstralski sangarin og sangskrivarin, Xavier Rudd, ið hevur boðið Lenu við sum upphiting á konsertferðini, ið skal gera Xavier Rudd til eitt kent navn í Evropa. Frammanundan er Rudd rættiliga vælumtóktur í heimlandinum. Serliga er hann kendur, fyri at vera góður á konsertum. Rudd spælir á hópin av ymiskum ljóðførum og verður vanliga bólkaður undir etniskanella heimstónleik.

Í løtuni ferðast Rudd sum upphiting fyri amerikanska rokk risan Dave Matthews Band.

Konsertferðin saman við Rudd er komin í lag gjøgnum nýggja kanadiska umboðsfelagið hjá Lenu, ið eisini umboðar Rudd. Fyrrverandi umboðsmaðurin hjá Lenu, Richard Ogden, flytur nú til Brasilia og tekur seg burtur úr ídnaðinum, og tí var tørvur á nýggjum umboðsfelag, og tá fall valið á Thompson Management í Kanada. Hetta umboðsfelag kendi til Lenu, og hevur áður víst áhuga í henni. Konsertferðin við Rudd kundi bent á, at hetta kann gerast eitt spennandi samstarv.

Konsertferðin byrjar í Madrid, har tey fara á pall í spælistaðnum Caracol 4. september, síðan gongur leiðin til Barcelona, Zurich, München, Franfurt, Rom, Milano, Berlin, Hamborg, Colognem, Brússel, Amsterdam, Paris, Brighton, Fallmouth Princess, Dublin, Edinburgh, Manchester, áðrenn tey enda í London 28. september. Ella við øðrum orðum 19 konsertir í 10 londum í 24 dagar.

Lena spælir 24. mai í Atlantis, men annars standa ikki nakrar aðrar konsertir í Føroyum á skránni, men sambært Niclas Johannesen manni og gittarleikara hjá Lenu eru onkrar konsertir í Føroyum, ið verða almannakunngjørdar í næstum. Hetta eru bæði konsertir við bert Lenu og Niclas, men eisini við bólki. Nýggja fløgan Let Your Scars Dance skal jú marknaðarførast í Føroyum.

Í løtuni arbeiðir umboðsfelagið hjá Lenu við at fáa í lag útgávusáttmálar kring heimin fyri hesa fløguna. Men Niclas vísir á, at hetta ikki hevur skund.

- Henda konsertferðin er fyrst og fremst fyri at gera vart við navnið hjá Lenu og fyri at skapa eitt sindur av áhuga, so nýggja fløgan nýtist ikki at vera komin út í teimum londum, sum vit vitja, sigur hann.

# Teitur gleðir seg til temunn og pannukøkur í Gøtu

**Teitur hevur seinnu árini verið fastur gestur á pallinum á G!Festivalinum, og aftur í ár verður føroyski trubadururin at hoyra á Gøtusandi.**

TÍÐINDASKRIV

»Nýggja fløgan hjá Teiti, »Káta hornið«, osar av stemningi, spæligleði og yvirskoti, og er snøgt sagt besta føroyska fløgan, ið eg havi fingið latið upp í hendurnar at ummæla øll hesi árini sum fastur ummælari hjá Dimmalætting.« So greið vóru orðini hjá Una L. Hansen, tónleikaummælara hjá Dimmalætting, tá ið hann skuldi lýsa nýggju føroysku fløguna hjá Teiti, »Káta hornið«. 6 av 6 møguligum d'um fekk fløgan, og er tað eitt skotsmál, ið bara ein onnur útgáva hevur fingið undan Teiti, nevniliga »Longst sum best« savnsfløgan hjá Tinganest. Tískil er tað við gleði, at G! triðja árið á rað kann bjóða gestunum absolutta toppkremið á føroyska tónleikapallinum live – í ár á føroyskum.

### G!-viðhaldsmaður

Teitur, ið er í holt við at pakka niður í London, nú hann flytir til Stokkhólm at búgva, viðgongur gjarna, at hann er G!-viðhaldsmaður.

- G! er ein fantastiskur festivalur, og tað er ein stór fragd fyri meg at kunna fylgja við í, hvussu festivalurin mennist ár eftir ár. Eg gleði meg altíð at koma á G! og fáa ein temunn og pannukøkur frá gøtufólki. Tað er ordiliga feitt, at tey eru so við upp á tað, og millum annað lata tónleikararnar hús teirra at búgv í. Tað skapar ein serligan stemning, ið tú ikki upplivir aðrastaðni. Tað er nakað serføroyskt yvir tí. Kanska er størsta aktivið hjá G!, at festivalurin liggur í Syðrugøtu, ið er so ómetaliga hugnalig og vøkur bygd, sigur Teitur úr London.

Teitur hevur upplivað flest allar útgávunar av G!, síðan festivalurin sá dagsins ljós í 2002. Tey fyrstu árini var hann vanligur gestur, meðan hann framførdi í 2005 og 2006.

- Fyrsta árið, ið G! festivalurin varð fyriskipaður, stimaðu vit inn í Kalbaksbátinum hjá okkum, fyri at hoyra MC Hár. Tá vit høvdu lagt bátin, undraðu vit okkum eitt sindur yvir, at eingin stóð og kravdi inn, so vit sluppu ókeypis á festival, greiðir Teitur læandi frá. Tað kemur tó eitt, ná, var tað tí, frá honum, tá ið hann frættir, at tunga innkrevjingar byrðan hetta árið lá á ungu herðunum hjá brøðrunum Jákupsson úr Gestum, Ólavi og Tórfinni. Teir eru jú ikki beinleiðis úr tí tilfari, inkasso-fólk eru gjørd av.

### Kendur uttanlands

Teitur merkir eisini, at G! er við at blíva eitt navn, ið útlendingar kennast við. Hann møtir eisini javnan fólki á sínum konsertferðum, ið hava spæla á G! og minnast aftur á upplivilsið við størari gleði, eitt nú Lisa Ekdahl og limirnir í Kashmir og Nephew.

- G! festivalurin skilir seg út í mun til teir stóru tónleikafestivalarnar, ið ofta hava lyndi til at líkjast. G! er ein lítil nissjufestivalur, ið vinnur upp á góða samanhaldið millum tónleikararnar og tætta tilknýtið til lokala umhvørvið. Man letur í stóran mun tónleikararnar passa seg sjálvar, og tilgongdin tiltalar nógv fólk innan bransjuna, ið kann vera rættiliga bæði hektisk og yvirflatisk, heldur Teitur, sum gleðir seg nógv at sleppa at framføra á føroyskum á Føroya feitasta festivali. Vit heilsa aftur, at vit gleða okkum sanniliga eisini!